VIÐMERKINGAR

# Altjóðagering



VAL05

## Sambandsflokkurin tekur altjóðageringina sum eina avbjóðing

**Alfred Olsen**
*Valevni á Sambandslistanum*

Altjóðageringin fer sum ein ylur um allan heimin í dag, og tí eru fyribrigdi sum altjóðasamfelagið ella heimssamfelagið blivin alt meira viðkomandi fyri okkum føroyingar.

Sambandsflokkurin metir, at Føroyar skulu vera ein partur av altjóðageringini og fáa ávirkan á gongdina og fáa okkara lut í tí ágóðanum, sum stendst av globaliseringini.

Sambandsflokkurin tekur tí sjálvandi ikki undir við teimum afturhaldsflokkum her heima, sum vilja grava seg niður, hava nokk í sær sjálvum, og hvørki tora ella vilja síggja veruleikan í eyguni.

Sambandsflokkurin er tí einasti flokkur sum veruliga vil virka fyri:

- At tey ungu fáa markleysar útbúgvingarmøguleikar runt um í heiminum.
- At tey sjúku fáa markleysar viðgerðarmøguleikar her heima og úti.
- At arbeiðsfólk fáa fríða atgongd til størv runt um í heiminum.
- At sjófólk okkara ikki blívur avmarkað til størv á brúnni, maskinrúminum v.m. í ríkinum og úti í verðini.
- At vinnan fær fríða atgongd til rávøruna og keypsmarknaðin fyri sína framleiðslu, við betri handilsavtalum við umheimin og øktum kvotum.
- At peningastreymurin hevur fríða atgongd til íløgur í føroysk virkir á landi, og at føroyskir íleggjararar hava fríða atgongd til íløgur uttanlands.
- At styrkja tað persónliga frælsi og øktum møguleikum fyri at fáa ávirkan, hjá hvørjum einasta føroyingi, og at skapa eina vinnu, sum virkar undir fríðum marknaðartreytum.

Uttanlands hava vit ávirkan, við tað at handilsflotin, fiskivinnan og alivinnan hava sett føroyingar sum skipsførarar og leiðarar, og Sambandsflokkurin vil virka fyri, at sama hendir í tænastuvinnunum, diplomatinum og mentunarlívinum uttanlands, tí harvið fáa vit ávirkan innan hesi økir.

Sambandsflokkurin virkar fyri, at tann einstaki persónurin, tann einstaka fyritøkan og alt tað føroyska samfelagið skal fáa mest møguliga ávirkan og lut í altjóðageringini.

Vel framtíðina, vel menningina, vel trygdina, vel Sambandsflokkin.

# Diplomati



VAL05

**Annika Olsen**
*Fólkaflokkurin*

Fyri at røkka sjálvræði og rættindi føroyinga er neyðugt við diplomatiskari umboðan. Fólkaflokkurin er einasti diplomatiski flokkur, ið kann ogna føroyingum trygg og góð rættindi.

# E pluss B dividera við tvey er lig við C



**Annita á Fríðriksmørk**
*Valevni Tjóðveldisfloksins*

Løgmaður veit sjálvandi, at tað riggar ikki fyri ein løgmann ongu støðu at hava á ríkisrættarliga økinum. So hann sigur bara aftur og aftur, at støða Javnaðarflokssins liggur einastaðni mitt í millum Tjóðveldisflokkin og Sambandsflokkin. Slíkar klisjé´ir eru týpiskt at hoyra frá lítlum flokkum, sum siga seg liggja inni á miðjuni í politikki. Í okkara føri er tað, sum at hoyra Gamla Sjálvstýri, tá ið man í dag hoyrir løgmann.

Men klaverið spælir sjálvandi ikki so væl, at tú bara kanst plussa tveir flokkar saman, - í hesum føri Tjóðveldisflokkin og Sambandsflokkin, og so dividera tað úrslitið við tvey, fyri síðani at siga at úrslitið av tí er mín støða.

Tað er tað sama sum at siga at súrepli pluss bananir dividera við tvey er lig við appelsinir. Jamen, tað gevur jú onga meining!

Sama trupulleika hevur løgmaður, tá ið hann (ella ein nevnd umboðandi hann) fer til samráðingar við danir um m.a yvirtøkulógina og um uttanríkispolitisku heimildarlógirnar. Har sigur hann, at tað er ikki ein spurningur um alt ella onki, og at okur mugu finna eina pragmatiska loysn. Men um løgmaður (-sa nevnd) fer til samráðingar við tí endamálið at finna eina pragmatiska loysn, og onki útspæl hevur við í skjáttuni, so nýtist einum ikki drúgvar royndir fyri at vita, hvør ið er vinnarin av tí "pragmatisku" loysnini.

Tí er mín áheitan á landsins leiðslu um at finna síni bein í ríkisrættarliga spurninginum! Finnur hann tey, gerst hann eisini førur fyri at finna eina pragmatiska loysn og harvið førir fyri at fara til gongu móti málinum. Tað hevði sømt seg einum, sum aftur bjóðar seg fram at tala søk føroyinga eisini niðri á Danatingi.

# Føroyar móti Eysturríki í Landskrona



VAL05

**Bill Justinussen**
*løgtingsmaður*

Tá føroyingar á fyrsta sinni stigu inn í altjóða fótbóltsheimin, vóru tað mong, sum settu seg hart ímóti hesum, tí vit ikki høvdu ein livandi møguleika at gera okkum galdandi. Tey flestu spáddu føroyingum stórtap, tí siðvandu fótbóltstjóðirnar vóru jú mannaðar við heimsstjørnum. Tó hoyrdi eg ongantíð um nakran føroying, sum fór at halda við mótstøðuliðunum, tí føroyingar ongan møguleika høvdu allíkavæl. Øll, sum eg veit um, hildu við føroyingum og gera tað framvegis, hóast tapini mangan hava verið í størra lagi. Ongan kenni eg, sum helt við øðrum landsliði, "tí vit føroyingar tapa allíkavæl".

### Í politikki er øðrvísi

Í politikki er hugburðurin øðrvísi og sera løgin. Her royna størru flokkarnir, sum fyri Miðflokkin kunnu metast javnt við mótstøðulið, at greiða veljarunum frá, at Miðflokkurin ongan møguleika hevur at fáa fólkatingsumboðan, og tí kunnu Miðflokkaveljarar tað sama halda við mótstøðuliðinum. Eg fari at heita á allar Miðflokkaveljarar um ikki at lata seg tøla av hesi tokutalu, tí fyri ein, sum heldur við Miðflokkinum, kann tað gera tað sama, hvør av hinum flokkunum fær fólkatingsumboð. Teir koma so ikki at umboða Miðfloksins politikk, tað hava vit prógv fyri.

### Sambandið og Tjóðveldið tagdu

Tá ein danskur kvinnufelagsskapur seinasta heyst bjóðaði sær at savna pening inn at hjálpa føroyskum kvinnum at fíggja fosturtøku í Danmark móti føroyskari lóggávu, heitti Miðflokkurin alment á Lisbeth og Høgna um at taka málið upp á Fólkatingi. Tað gjørdu tey ikki, og tí havi eg ikki álit á, at aðrir flokkar megna at umboða sjónarmið okkara. Øll tit, sum so dyggiliga gjørdu Miðflokkin til sigursharra á løgtingsvalinum fyri einum ári síðani: Haldið við Miðflokkinum enn einaferð, tað gevur okkum styrki og staðfestir okkara støðu í føroyskum politikki. Lat hini um teirra viðurskifti, latið okkum standa saman!

# Vit skulu seta ferðina sjálv



VAL05

**Elin Heðinsdóttir Joensen**
*fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*

Hóast tað sjáldan tekur langa tíð at læra tey smáu at ganga í takt, so tykist hetta als ikki at vera eins lætt, tá talan er um vaksin - og als ikki, tá talan er um politikarar.

Ikki minst hava vit sæð hetta, tá talan hevur verið um sjálvstýristilgongdina, har tað enn ikki er eydnast nøkrum at fáa øll at ganga í takt. Heldur vilja øll tvíhalda um sínar »patentloysnir«, ið kortini sjáldan víkja langt frá teimum hjá hinum.

Javnaðarflokkurin hevur eina savnandi ætlan, ið er besta boðið upp á ta nógv saknaðu semjuna í sjálvstýrismálinum, so tilgongdin kann skipast eftir føroyskum vilja, fult og heilt!

Amboðið til at fremja hesa ætlan er yvirtøkulógin, ið sleppur okkum undan øllum teimum óneyðugu ósemjunum, samstundis sum vit kunnu yvirtaka málini, so hvørt føroyskur vilji er til tað. Meira demokratiskt fær tað ikki verið!

Hesin semjusøkjandi politikkur fer eisini at síggjast aftur í góðari føroyskari umboðan á fólkatingi, um tú gevur Javnaðarflokkinum møguleikan at fremja føroysk áhugamál við einum væl valdum umboði. Ein atkvøða fyri lista C er títt íkast, og afturfyri verður tín rødd hoyrd á fólkatingi!

Lesið Sosialin - so eru tit við